## DAGSINS MEINING

# Einki náp frá Napster

Mánakvøldið varð kunngjørt at internettænastan Napster fyribils skal halda uppat. Tænastan, sum er væl umtókt millum ung, snýr seg um at útvega tónleik, sum tey ungu sjálvi leggja út á netið og brúka sínámillum. Fleiri brúkarar, ið eru, stórri verður úrvalið og harvið útbreiðslan. Uttan um handlarnar og alt tað handilsliga renslið. Øll, ið eru brúkarar, kunnu verða nøgd, tí á henda hátt ber til at fáa tónleikin beint heim í kamarið, har ungdómsteldan við teim stóru hátalarunum vanliga stendur, sum ein onnur jukeboks.

Í áhugaverdari grein í Vikuskiftinum síðsta leygardag, greiðir tónleikarin Edmund Jacobsen frá um teldur og tónleik og hvussu ein kann brenna sær fløgur. Ein hentur eginleiki, var tað ikki tað, at hann var brand ólógligur. Tí her er talan um at nápa verk, sum í vælferðarsamfelag okkara eru vard av lóggávu um upphavsrættindi, so sum greinskrivarin eisini vísir á.

Men gongdin í samfelagnum er so, at tøknin gongur hond í hond við eftirspurning og støðuga kravið um undirhald. At tøknin bráddliga gerst so framkomin, at hon í einum og øllum verður dugnaliga brúkaranum til vildar, er bert at fegnast um. Og tó. Hóast hetta snýr seg um makt og megi hins einstaka mótvegis risastóru, altjóða fyritøkunum, so er vandi í hvørjari vælferð.

Á tøkniliga økinum fær brúkarin størri og størri rásarúm. Í skúlanum munnu lærarar longu hava lært, at næmingarnir duga teldutøkni og alt, sum har til hoyrir, so nógv betri enn sjálvt hin best skúlaði lærarin.

Innan miðlar mugu vit eisini ásanna, at tann tign, sum liggur í journalistiska yrkinum er fyri sama falli. Í dag er tað ikki einans journalisturin, ið ger av, hvat vit fáa at vita og harvið kunnu taka støðu til og fáa haldgott innlit í. Dugnaligi og forvitni brúkarin hevur eisini á hesum øki yvirhálað journalistarnar. Men aftur her hava vit bruk fyri navigatiónini. Teirri professionellu navigatiónini, sum dagliga kann solda dumbu og bos frá veruligum gróni. Tað er ivaleyst størsta framtíðar avbjóðingin hjá bæði journalistum og lærarum okkara.

Dagsins tøkni hevur givið fólki ein framúr møguleika at sýna makt og megi yvirfyri allar yvirvøld. Starvsmannafelagið vísti okkum hetta í verki fyri longu drúgvari tíð síðani. Men í tí aktuella førinum kunnu vit við støði í tøknini eisini læra okkum at seta spurnartekin við, hvør vinnur mest, tá undirhaldsmaskinan fer í gongd.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

# Minni um Heidi Jensen

Heidi var eldri enn eg, tí høvdu vit ikki so nógv saman í yngri árum. Okkara felagsgøta byrjaði við einum túri í Ísrael í 1989. Vit skuldu hava kamar saman, men sum eitt typiskt væleydnað vinarlag, dámdi mær einki í fyrstani, at akkurát eg skuldi verða vald at hava kamar saman við henni, tí vendi eg mær til ferðaleiðaran og bað um eina forkláring. Hann segði, at áðrenn hann hevði avgjørt hvussu alt skuldi passa saman, var tað eitt, sum segði við hann, at soleiðis skuldi tað verða. Tað vísti seg, at áðrenn túrurin fekk sína byrjan, blivu vit eitt við hvørja aðra, tað var onki loyndarmál so stórt, at vit ikki kundu deila tað við hvørja aðra. Vit vóru saman allan túrin, hini plagdu at siga, at um Heidi sást, so mátti eg vera heilt nær.



Stutt eftir at vit vóru komin heim av túrinum bleiv eg upp á vegin, átti ein son og flutti til Íslands fyri at fáa mær eina útbúgving. Okkara vegir skiltust. Boð komu til Íslands at Heidi var heilt sjúk og mátti stríðast nógv, hon vann og kom fyri seg aftur. Tá eg var heima, vitjaði eg hana og vit tosaðu um gomul minni. Seinni bleiv eg eisini sjúk, tað svaraði til somu sjúku, Heidi hevði. Hetta knýtti okkum aftur saman, tá vit møttust aftur her niðri í Danmark í 1999. Tá vit hittust, um tað ikki var so ofta, hugdu vit at gomlum myndum og flentu at ymsum, sum vit biltu okkum inn sum yngri gentur.

Tað var nakað serstakt millum meg og Heidi, tað sást á mátanum, vit tosaðu vit hvørja aðra uppá.

Knappliga ein dag, eg kom frá arbeiði, fekk eg at vita, at Heidi ikki var millum okkum meira. Eg skilti tað ikki, tí eg hevði ikki sagt farvæl. Í nógvar dagar gekk eg og hopaði, at hetta mundi bara vera ein dreymur og eg fór skjótt at vakna.

At enda skilti eg, at Gud hevði kallað Heidi heim, tí hann hevði brúk fyri henni.

Eina náttina fekk eg ikki blund í eyguni, eg royndi alt, men onki nyttaði, tað kendist sum eg mátti upp, okkurt fekk meg at taka pennin í hondina og skriva. Tá eg var liðug, las eg tað sum stóð á pappírinum. Mín hond hevði skrivað, men tað vóru ikki míni orð.

Góða Heidi, eg gloymi teg aldri, títt smíl og tín látur vil eg altíð goyma í hjartanum. Tú gav mær meira enn tú var klár yvir. Eitt uggar meg, tað er at eg veit, at vit einaferð skulu møtast aftur.

Hetta er tað, eg skrivaði ta náttina:

Góða mamma kann tú lova mær,
nú eg leggi meg at sova,
ikki mást tú um eg gráta,
men við meg gjøgnum Gud práta.

Eftir lati eg døtur tvær,
tær dýrabarast eru mær,
gev tú teimum alt tað besta,
krúnu Guds tú tá skal heysta.

Ókend er okkara lívsins leið,
um skepnuna vit vita ei,
ikki syrgja um meg leingi,
glað eg hvíli í Jesusar fangi.

Tá ið endar lívsins gøta,
eg tær hinumegin skal møta,
glað og løtt vit tá dansa vilja,
einki kann okkum tá sundur skilja.

Gud hevur givið tær gávu dýra,
systkin míni á jørðini fýra,
víðari tú fyri tey má liva,
ikki bera Gudi nakran iva.

Á himli tvær stjørnur eigur tú,
sita vita her og hyggja nú,
ikki eg eri eina, nú havi eg frið,
bróður mín mær situr við lið.

Styðja tú mínar døtur,
gjøgnum tungar løtur,
tær tá skulu elska teg,
líka sum tú elskar meg.

Tín verndareingil eri eg,
hjálpi mær á lívsins veg,
gjøgnum Guds góða anda,
vit altíð saman standa.

*Esbjerg des. 2000*
**Yvonna Drangberg**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið sýndu samkenslu, tá kæri beiggi, svágur, mammubeiggi og ommubeiggi okkara

**Hans Olsen**

doyði og varð jarðaður

Ein serlig tøkk til starvsfólkið á D7 á Landssjúkrahúsinum, ið vóru so góð við hann og passaðu hann so væl til hann andaðist. Tøkk til prest fyri góð og troystarrík orð. Tøkk fyri blómur og kransar og fyri stóra hjálp í sambandi við jarðarferðina og ervið aftaná.

*Fyri tey avvarðandi*
**Sonne, Rosa og Trygvi**

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 348mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



# Vóna samstarv við føroyingar

**Fiskivinnan í Aberdeenshire í Skotlandi vónar at fáa í lag samstarv við føroyingar. Skotar hava brúk fyri nýggjum rávøruveitarum**

FISKUR
*Eyðun Klakstein*

Fiskivinnan í Aberdeenshire í Skotlandi manglar rávøru, og tí royna skotar at finna nýggjar møguleikar fyri at tryggja sær rávørugrundarlagið.

Í hesum sambandi vóru seks umboð fyri myndugleikarnar og vinnuna í Aberdeenshire í Klaksvík um vikuskiftið. Tey hugdu eftir viðurskiftunum í Klaksvík og hittu vinnulívsfólk.

– Vit vóna at fáa samstarv við føroyingar, sum bæði vit og tit kunnu fáa gleði av, segði Raymond Bissit, sum er formaður í stýrinum fyri Aberdeenshire, tá hann hitti varaborgarstjóran í Klaksvík leygardagin.



*Raymond Bisset, formaður í stýrinum fyri Aberdeenshire, handar Torleif Sigurðsson, varaborgarstjóra í Klaksvík, eina sokallaða vinaskál*

## Brúka smærri fisk

Aberdeenshire er økið uttan um sjálvan Aberdeen bý. Í hesum øki liggur fiskivinnubýurin Peterhead, har størsta uppboðssølan av fiski í Europa fer fram.

Uppboðssølan í Peterhead er skipað nakað øðrvísi enn tann føroyska. Fleiri ymisk feløg selja fisk á uppboðssøluni, og øll søla fer fram á gólvinum.

Tað, sum skotar vóna, er, at føroysk skip eru sinnað at selja fisk umvegis uppboðssøluna í Peterhead, og at hetta fer at koma fiskivinnuni á staðnum til góðar, samstundis sum føroyingar eisini skulu fáa okkurt burtur úr samstarvinum.

– Tær fiskastøddirnar, sum tit meta at verða smáar, eru ikki smáar hjá okkum, og tí kann tað vera ein fyrimunur fyri føroyingar at selja hendan fiskin í Peterhead, sigur Roy Malcolm, sum er stjóri í felagnum Peter & J. Johnstone Ltd, sum er eitt av feløgunum, sum selir fisk á uppboðssøluni í Peterhead.

## Samstarva

Í skotska ferðalagnum vóru tvey almenn umboð og fýra umboð fyri vinnuna.

Vinnan og myndugleikarnir royna at samstarva, nú fiskivinnan í Aberdeenshire fer at merkja avleiðingarnar av toskabanninum hjá ES, sum verður galdandi næstu tríggjar mánaðirnar.

– Trupulleikarnir hjá vinnuni hava fingið myndugleikarnar at samstarva við vinnuna um at gera eitthvørt, tí vit eru greið yvir, at um vit ikki gera okkurt, fer tað at merkjast í økinum, at minni fiskur er at virka, sigur James Stephen, sum er fíggjarstjóri á virkinum Sco-Bere.

– Men tað eru ikki bara átrokandi trupulleikarnir sum gera, at vit ætla at samstarva við føroyingar. Vit vóna at skapa grundarlag fyri varandi samstarvi, sum báðir partar kunnu fáa ágóða av, sigur hann.



*Skotarnir hittu almenn og vinnuumboð úr Føroyum undir vitjanini í Føroyum*

## Vitjaðu virki

Skotska ferðalagið kom til Klaksvíkar fríggjakvøldið Leygardagurin varð brúktur til at vitja ymisk virki í Klaksvík og at tosa við vinnulívsfólk. Eisini hittu skotarnir varaborgarstjóran í Klaksvík, Torleif Sigurðsson.

– Vit hava fingið nógv burtur úr hesi vitjan, og vit hava sæð, hvussu frammaliga tit eru innan fiskivinnuna. Okkara virki eru ikki eins væl útgjørd við maskinum, sum tykkara eru, sigur James Stephen.

Sunnudagin fóru skotarnir úr Føroyum aftur, og nú skal tíðin vísa, um nakað samstarv spyrst burtur úr vitjanini hjá skotunum.

# Looknorth letur upp



*Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa, handar Árna Skaale, stjóra á Looknorth, málning í sambandi við, at virkið nú letur upp*

Fríggjadagin var móttøka á nýggjasta virkinum í Klaksvík, Looknorth.

Virkið, sum skal framleiða kassar til ali- og fiskivinnuna, fer nú undir sítt virksemi, og ætlanin er, at virki skal kunna lata kassar frá komandi viku.

Undir móttøkuni vóru maskinurnar á virkinum royndarkoyrdar, og fólk sóu, hvussu framleiðslan av kassum fer fram.

Looknorth leggur seg fyrst og fremst eftir at lata kassar til vinnuna í Norðoyggjum. Virkið liggur væl fyri á vestara kaiøki í Klaksvík, og stuttur teinur er til fleiri av virkinum, sum brúka slíkar kassar.

Beint niðanfyri Looknorth skulu Faroe Salmon og East Salmon byggja nýtt krivjivirki, og tað er ikki minst slíkt virki, ið brúkar kassar.

**ek**

TK Stovan

**HUMAN RESSOURCE MANAGEMENT**

**Mikudagin 21. feb. kl. 8.00 á Hotel Føroyum**

**Skrá fyri skeiðið:**

**Kl. 08:00** Skráseting og morgunmatur
**Kl. 08:30** Hvat er HRM
- Leví er tað íkomið
- Hvat inniheldur HRM av ítøkiligum framferðarháttum
- Hvørjar eru fylgjurnar, tá HRM verður nýtt
- Hvørji krøv setur HRM til toppleiðslu og virkismentan

**Kl. 10:00** Steðgur
**Kl. 10:15** Bólkaarbeiðið og samrøða
- Hvussu verður HRM nýtt í tínum bygnaði?

**Kl. 12:00** Døgurðasteðgur
**Kl. 12:45** Viðgerð av ávísum evnum
- Starvsfólkaábyrgdin hjá tí einstaka leiðaranum
- Starvsfólkaviðurskiftum í smærri fyritøkum/stovnum
- Førleikamenning
- Lívsleiðin (karriera)
- Onnur evnið eftir tørvi

**Kl. 14:30** Bólkaarbeiðið og samrøða
- Hvørjar forðingar eru í bygnaðinum fyri at gagnnýta HRM til fulnar?

**Kl. 15:15** Steðgur
**Kl. 15:30** Hvussu koma vit víðari
- Kjak um hvussu luttakararnir kunnu brúka skeiðið í teirra gerandisdegi

**Kl. 16:30** Eftirmeting og uppsamling
**Kl. 17:00** Endi

**Tilmelding:** TK Stovan, fax nr. 31 93 63, tlf. nr. 31 73 66 ella teldupost tk@tk.fo
**Kostnaður:** kr. 1.700,00 u/mvg íroknað døgurða
Tilmelding í seinasta lagi **mánadagin tann 19. feb. 2001 k. 13.00**i

Virkisnavn:______________________Tal av luttakarum:__________

Navn/Nøvn:______________________________________

______________________________________

Tlf:______________________Fax:______________________

**TK Stovan**
Niels Finsensgøta 37, FO-100 Tórshavn
**Tel** +298 317366, **Fax** +298 319363
tk@tk.fo
**www**.tk.fo

**VILJI VITAN VØKSTUR**
TK Stovan er ein liður í menningini av føroyska vinnilívinum og samstundis ein partur av tí umfevnandi danska TIC-kunningarsamstarvinum.